# Jákup á Ternuni 90

Mánadagin 9. februar fylti Jákup Joensen í Klaksvík, vanliga róptur Jákup á Ternuni, 90 ár.

Jákup er klaksvíkingur, sonur Malvinu, f. Steffensen (1896-1991) úr Árnafirði, og Jákup Joensen (1892-1953), bónda í Gerðum í Klaksvík. Jákup er næstelstur av teimum tilsamans 10 børnunum hjá Malvinu og Jákupi, sum eru: Jógvan (Gerðalíð), Jákup, Solborg, Absalon, John, Erland, Benjamin (Benni), Karla, William (Willi). Yngst var ein drongur sum livdi heitt stutt. Erland, Absalon og John eru deyðir.

Jákup er giftur Steinvør, dóttir Olevinu og Heina Heinesen úr Kunoy. Tey eiga trý børn: Leivur, Ingun, og Anna Maria. Næstelsta barnið, Heini, føddur í 1951, doyði bert 9 mánaðir gamal.

Í nøkur ár sigldi Jákup við fiskiskipum, til hann í 1948 byrjaði at sigla við posti fyri Hugo Gardar. Har var hann til 1970, tá hann fór at sigla við Ternuni um Leirvíksfjørð.



*Mong minnast Jákup frá tíðini, tá hann sigldi við Ternuni um Leirvíksfjørð. Við sínum lætta og skemtingarsama lyndi, fekk hann altíð láturin at runga millum ferðafólkini*

Tað, sum Jákup helst er best kendur fyri, eru hansara smáu, men stuttligu viðmerkingar, sum altíð fingu láturin at runga, tá hann kom at krevja pening frá ferðafólkunum.

Jákup hevur verið av raskastu monnum, hann er kendur fyri at verða framúr kvikur maður, og á fjalli kom eingin honum nær í hegni og skjótleika. Í sjómansskapi var hann millum teir frægastu. Hann legði ofta nógv fyri, tá tað galt um at fáa post og vøru í land á brimplássum.

Steinvør og Jákup búgva í dag á Røktarheiminum í Klaksvík.

*-red*

## Andlát og jarðarferðir

**Poul Jensen**, ættaður úr Vági, verður jarðaður úr Herlev kirkju, fríggjadagin 13. februar kl. 11.00.

Kistan við **Fredag Kambsenni** ferúr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Betesda hósdagin kl. 13 hagani farið verður til kirkjugarðin í Fuglafirði. Tey, ið vilja minnast Fredag kunnu lata eina peningagávu til Akurin. Konta í peningastovnunum.

**Agnes Sørensen**, kona Svein Sørensen í Rødovre, andaðist mánadagin 9. februrar, 84 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni

**Jutta Olsen**, fødd Tausen, ættað úr Hovi, búsitandi í Tórshavn, andaðist sunnumorgunin 8. februar, 81 ára gomul. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13 úr Havnar Kirkju. Tey sum vilja minnast Juttu, kunnu geva Sinnisbata eina gávu. Konta í peningastovnunum. Konta í peningastovnunum.

Rætting:

# Prógvhandan í psykiatri



Í blaðnum mánadagin 9. februar høvdu vit mynd við teimum, sum fríggjadagin 6. februar fingu prógv handað á Landssjúkrahúsinum í sambandi við “Tværøkiseftirútbúgving í psykiatri“.

Í myndatekstinum komu onkur starvsheiti skeivt fyri, tí verða nøvnini skrivað her við røttum starvsheiti.

**Aftara rað: f.v.:** Lars Østrup Brøgger, seminarlærari, Lisbeth Dybro, skeiðleiðari, Malan Hansen, heilsurøktari, Guðrið í Bartalsstovu, heilsurøktari, Kala Debes, heilsurøktari, Ingun Durhuus, sjúkrarøktarfrøðingur, Irdi Danielsen, ergoterapeutur, Elsebeth Sanna á Krákusteini, pedagogur, Elsa Klein Olsen, pedagogur, Malan B.Hansen, heilsurøktari, Heðin Samuelsen, hjálparfólk, Inga A.M. av Reyni, pedagogur, og Marianna Vang, ergoterapeutur.

**Fremra rað f.v.:** Ann-Britt Mortensen, sosialráðgevi, Randi Borðoy, sjúkrarøktarfrøðingur, Jóhanna við Streym, sjúkrarøktarfrøðingur, Sunrid á Borg, sjúkrarøktarfrøðingur, Jana Mortensen, sjúkrarøktarfrøðingur, Birgit Andersen, deildarleiðari, Marnar Tausen, pleygari, Óluva Poulsen, sjúkrarøktarfrøðingur, og Ása Isaksen, sjúkrarøktarfrøðingur.

Hesar vanta á myndini: Sofía Elisa Hansen, sjúkrarøktarfrøðingur, og Joana Sørensen, heilsurøktari.




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýføddabarninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

Lesið Sosialin -so eru tit við!